STUDNI
Student Grant Fund

# Endalig fráboðan um barnsburðarfarloyvi

**Persónsupplýsingar** (Nýtið kúlupenn og spjaldrastavir)

| | | |
|---|---|---|
| P-tal<br>__ __ __ __ __ __ - __ __ __ __ | Teldupostadressa | Telefon/fartelefon |
| Øll fornøvn | Eftirnavn | |
| Gøta / nr. | Postnr. | Býur/bygd |

**Útbúgvingartíðarskeið**

Útbúgvingin byrjað (dag. mán. ár) - Væntandi lokin (dag. mán. ár)

**Útgjaldingarháttur**

Peningurin skal flytast á kontu ____ - _______

Skrásetingarnr. Kontunr.

**Barnsburðarfarloyvið var:**

| Farloyvi frá | | Farloyvi til | Lesturin byrjar aftur |
|---|---|---|---|
| dag. mán. ár | - | dag. mán. ár | dag. mán. ár |

**Viðmerkingar**

**Váttan frá skúla / lærustovni**

Undirskrift og stempul frá skúla / lærustovni

**Váttan**

Eg vátti undir trúnaðartreytum, at tær givnu upplýsingar eru rættar.

Dagfesting ____________________ Undirskrift umsøkjarans ____________________

*Sí vegleiðing á baksíðuni*

**Studni – Hoyvíksvegur 72 – Postrúm 9 – FO - 110 Tórshavn**
**Heimasíða:** www.studni.fo **- T-postur:** studni@studni.fo

**Dagført 09.07.2026**

# Vegleiðing viðvíkjandi barnsburðarfarloyvi til  lesandi

**Í stuttum kann sigast um skipanina:**

- stuðul verður veittur í sambandi við barnsburð og ættleiðing.
- stuðul verður í mesta lagi veittur í 11 mánaðir. Tó kunnu einsamallir uppihaldarar og aspirantar fáa stuðulin í upp til 12 mánaðir.
- stuðulin er tann sami, sum tann lesandi vanliga fær.
- bæði foreldrini kunnu ikki samstundis fáa barnsburðarfarloyvisstuðul úr skipanini.
- tann lesandi skal búgva saman við barninum fyri at fáa barnsburðarfarloyvisstuðulin.

**Harafturat er ásett:**

- at stuðulin vanliga verður veittur frá terminsdagfesting, men kann veitast kvinnum 1 mánað áðrenn og í serstøkum førum 2 mánaðir fyri termin.
- stuðulin kann eisini veitast frá upp til 3 mánaðir eftir føðing.
- stuðulin er óheftur av teimum rættindum, sum vunnin eru úr øðrum skipanum.
- rætturin til stuðulin kann verða varðveittur, um tann lesandi skiftir útbúgving í barnsburðarfarloyvistíðini treytað av, at tann lesandi er innskrivaður á eini útbúgving.
- um barnsburður ella ættleiðing fer fram áðrenn útbúgvingin byrjar, hevur tann lesandi rætt til at fáa barnburðarfarloyvisstuðul tað tíðarskeiði, sum eftir er av teimum 11 ella 12 mánaðunum.
- um barn/fostur doyr, verður rætturin til barnsburðarfarloyvisstuðulin til kvinnuna varðveittur, tá ið føðing er farin fram.

Barnsburðarfarloyvisskipanin gevur báðum foreldrum somu rættindi. Bæði tann lesandi móðirin og lesandi faðirin kunnu fara í farloyvi, treytað av, at tey ikki eru í barnsburðarfarloyvisskipanini samstundis. Við øðrum orðum fylgir barnsburðarfarloyvisstuðulin barninum uttan mun til, um tað er móðirin ella faðirin, ið velur at fara í farloyvi. Foreldrini avgera sjálv, hvussu tey býta farloyvið ímillum sín.

**Mannagongd**

Lesandi kunnu í dag fáa útbúgvingarstuðul í upp til eitt ár út um ásettu lestrartíðina. Ein lesandi kann t.d. fáa stuðul í 5 ár til eina 4 ára langa útbúgving. Fær ella ættleiðir lesandi eitt barn í útbúgvingartíðini og tekur fult barnsburðarfarloyvi, gevur barnsburðarfarloyvisskipanin tí lesandi møguleika fyri at fáa útbúgvingarstuðul í upp til 6 ár til eina 4 ára langa útbúgving. Velur tann lesandi hinvegin t.d. at lesa hálva tíð í eitt ár,  er møguleiki at fáa stuðul í upp til 5½ ár til eina 4 ára langa útbúgving. Velur tann lesandi at taka barnsburðarfarloyvi í ½ ár, er eisini møguleiki at fáa stuðul í upp til 5½ ár til eina 4 ára langa útbúgving. Við øðrum orðum verður farloyvistíðin løgd afturat loyvdu stuðulstíðini.

Á skjalinum "Umsóknarblað til barnsburðarfarloyvi" skal tann lesandi saman við lærustovninum boða Studna frá, tá hann fer í barnsburðarfarloyvi. Lærustovnurin skal eisini  beinanvegin, tá tann lesandi byrjar aftur á lærustovninum, á skjalinum "Endalig fráboðan um barnsburðarfarloyvi", boða frá, at tann lesandi er byrjaður aftur á lærustovninum.